# Jólasølan royndist væl

**Um vikuskifti var árliga jólasølan, sum Føroya Heimavirkisfelag skipar fyri, hildin í Badmintonhøllini í Havn. Umleið 50 fólk sýndu fram og seldu á ymsu básunum, og nógv fólk vitjaði stevnuna.**

JÓLASØLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Eitt afturvendandi tiltak, nú tað styttist til jóla, er árliga jólasølan, ið Føroya Heimavirkisfelag skipar fyri. Í ár var 9.ferð, at tiltakið varð sett á skránna.

Hesaferð vóru umleið 50 fólk úr øllum landinum í Badmintonhøllini og sýndu fram og seldu sína heimagjørdu vøru. Áhugin fyri at sleppa at vera við var tó størri enn so, men pláss var ikki fyri fleiri.

Umleið 490 limir eru í Føroya Heimavirkisfelag kring landið, og seinnu árini eru eisini fleiri ung komin við í felagið.

– Tað tykist, sum um heimagjørt er vorðið modernað aftur, og vit fáa fleiri og fleiri ungfólk sum limir í felagið, sigur Jórun Vang, ið er virkin í Føroya Heimavirkisfelag.

Árliga tiltakið í Badmintonhøllini er fyrst og fremst ætlað sum ein møguleiki hjá fólki, ið fáast við tílíkt, at sleppa av við sína vøru, eins og endamálið er at skipa fyri tveimum hugnaligum døgum, har fólk kunnu koma saman.

Tað kostaði einki at koma inn til jólasøluna, ið var væl vitjað. Serliga sunnudagin var høllin full av fólki.

– Eg haldi, at fólk eru glað fyri hetta tiltakið, og hugna sær við at ganga millum borðini og hyggja at ymsu heimagjørdu vøruni, kanska fáa sær ein kafffimunn, og annars práta við fólk. So eingin ivi er um, at jólasølan eisini verður aftur á skránni næsta ár, sigur Jórun Vang.

Fyri Føroya Heimavirkisfelag skal tiltakið við jólasøluni einans hvíla í sær sjálvum, meðan luttakararnir fáa tað burturúr, ið tey megna at selja báðar dagarnar.



*Nógv var at fáa á árligu jólasøluni hjá Føroya Heimavirkisfelag í Gundadalshøllini um vikuskifti. Umleið 50 fólk úr øllum landinum sýndu fram og seldu sínar vørur á stevnuni, ið varð væl vitjað.*

*Mynd: Jan Múller*

# Vágafólk nøgd við broyttu prísirnar

**Líkt er til, at brotasjógvarnir ímóti P/F Vágatunnilin eru um at leggja seg, eftir at felagið fríggjadagin kunngjørdi nýggjar og væl bíligari prísir fyri at nýta fasta sambandið undir Vestmannasund. Nú fer tað at bera til hjá vágafólki og øðrum at koyra ígjøgnum fyri 56 krónur hvønn vegin, sum er væl bíligari enn prísirnir við Strandferðsluni um sundið. Tó er ynski framvegis um bíligari prísir fyri tey, sum dagliga skulu nýta tunnilin**



*Á tíðindafundi 14.november almannakunngjørdi leiðsla og nevnd í P/F Vágatunnilin prísirnar fyri at nýta fasta undir Vestmannasundi. Men eftir hart trýst í góðar tvær vikur varð prísurin fríggjadagin endurskoðaður og lækkaður munandi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

VÁGATUNNILIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Eftir mikið rok og nógvar fundir í góðar tvær vikur gjørdi P/F Vágatunnilin fríggjadagin av at broyta prísirnar fyri at nýta undirsjóvartunnilin, longu áðrenn tunnilin verður tikin í nýtslu, týsdagin í næstu viku.

Við nýggju og broyttu prísunum verður tað væl bíligari at koyra undir Vestmannasund, enn tað í dag kostar at sigla um sundið. Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin segði í tíðindaskrivi fríggjadagin, at felagið hevur fylgt við í umrøðuni av nýtslugjaldinum í fjølmiðlunum, og hevur eisini havt samband við einstaklingar, flutningsfyritøkur, tinglimir, politiskar flokkar og kommunalpolitikarar í Vágum. Og m.a. við støði í hesum hevur P/F Vágatunnilin gjørt av at endurskoða prísirnar, ið felagið kunngjørdi 14. nov. Nú verður mett, at 400 bilar í meðal fara at nýta tunnilin um samdøgrið, og harumframt verður ein royndaravsláttur uppá 15 prosent latin, í fyrstu syftu fram til 31. marts. Eisini sigur felagið seg hava endurskoðað rakstaratølini og er komið til ta niðurstøðu, at við at leggja raksturin saman við tí hjá P/F Norðoyatunnlinum ber til at lækka rakstarkostnaðin av Vágatunnlinum úr 20 milliónum niður í 18,5 milliónir krónur um árið.

Tá tunnilin letur upp 10. desember, fer ein túrur við persónbili at kosta 188 krónur aftur og fram, ella 94 krónur hvønn vegin. Við fimmtúra korti fer tað at kosta 75 krónur hvønn vegin, meðan kostnaðurin verður 56 krónur, um tú hevur 20-túra kort.

Eisini stóru bilarnir sleppa væl bíligari enn upprunaliga ætlað, og tað kemur serliga væl við hjá vinnulívinum í Vágum.

## Nøgdir tingmenn

Vágatingmenninir Jóanis Nielsen og Marjus Dam eru sum heild væl nøgdir við endurskoðaðu prísirnar. Báðir føra teir fram, at ynski hjá vágafólki var at fáa eina generella príslækking, ið ger mun, umframt at vinnan mátti sleppa bíligari. Hesi ynski hevur leiðsla og nevnd fyri P/F Vágatunnilin gingið á møti, og í flestu førum verður tað bíligari hjá vágafólki og øðrum at nýta undirsjóvartunnilin enn at nýta verandi ferjusamband. Harumframt má so havast í huga, at nú slepst undan mangan drúgvu bíðitíðini báðu megin sundið, føra tingmenninir fram.

Hóast P/F Vágatunnilin hevur boðað frá, at talan bara er um ein royndaravsláttur uppá 15 prosent, hetta til 31. marts, og at prísurin fer at hækka aftur, vísir tað seg at grundarlag ikki er fyri lága prísinum, so eru tingmenninir sannførdir um, at prísirnir fara at halda, tí ferðslan verður í hvussu so er 400 bilar um samdøgrið.

Hóast teir eru væl nøgdir, so meta bæði Jóanis Nielsen og Marjus Dam at ein serlig skipan eigur at setast í verk fyri pendlarar, tað eru tey, ið dagliga skulu nýta tunnilin fyri at sleppa til og frá arbeiði. Teir kundu hugsað sær einhvørja skipan við einum mánaðarkorti fyri henda bólk, og vísa á, at hóast prísirnir eru lækkaðir, so skulu fólk, ið koyra við egnum bili gjøgnum tunnilin hvønn dag til arbeiðis, framvegis gjalda væl yvir 2000 krónur um mánaðin fyri hetta. Og tað er ov mikið, meta vágatingmenninir.

## Broyta ferðastuðulin

Ein annar spurningur, ið Jóanis Nielsen og Marjus Dam ætla sær at viðgera við Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, er at broyta ferðaískoytið, ið verður latið til fólk, ið búgva í einum parti av landinum, og arbeiða í øðrum parti. Umframt at landskassin í dag letur ávíst gjald fyri hvønn kilometur, fólk hava til arbeiðis, er frástøðan meira enn 15 kilometrar, so fáa fólk eisini nakrar krónur í stuðli til at gjalda fyri ferðaseðilin við skipunum hjá Strandferðsluni, skulu tey um firðir og sund til arbeiðis.

Men nú vágafólk ikki longur skulu um sundið, men í staðin kunnu koyra undir sundið, halda vágatingmenninir tað vera rímiligt at broyta ferðastuðulin, so fólk, ið til dømis búgva í Vágum og arbeiða í Havn, eisini fáa stuðul fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin.

## Marjus leggur uppskot fyri tingið kortini

Seinastu vikurnar hava vágatingmenninir hótt við at leggja uppskot fyri løgtingið, fór prísurin ikki at broytast munandi.

Marjus Dam sigur, at hann framvegis ætlar sær at leggja uppskot fyri tingið, hóast broytta prísin. Marjus Dam førir fram, at framvegis metir, at ov stórur partur av kostnaðinum og rakstrinum skal fíggjast við nýtslugjaldinum, tvs. í størsta mun av vágafólki. Tí fer hann at skjóta upp, at 40 krónur verða lagdar omaná ferðaavgjaldið, tá fólk ferðast uttanlands umvegis flogvøllin. Hetta gjald er í dag 120 krónur. Hann vísir á, at umleið 80.000 fólk ferðast av landinum um árið, og tí hevði ein hækking uppá 40 krónur givið eina inntøku uppá 3,2 milliónir krónur, ið skuldu farið til P/F Vágatunnilin.

## Broyting fyri Strandferðsluna

Á Strandferðsluni eru tey í løtuni í holt við at rokna av nýggjum, hvat prísbroytingin hjá P/F Vágatunnilin fer at merkja fyri ferðaseðlakostnaðin við Bygdaleiðir vestur í Vágar. Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, væntar, at tey verða klár við nýggjum prísum seinni í vikuni.

Royndaravslátturin upp á 15 prosent er íroknaður prísin. P/F Vágatunnilin hevur boðað frá, at hesin er fyribils galdandi til 31. marts næsta ár.

### Fakta

Endurskoðaðu prísirnir fyri at nýta Vágatunnilin.
Talan er um prísin annan vegin:

| | 1 túr | 5-túra kort | 20-túra kort |
|---|---|---|---|
| Bilar, styttri enn 6 m | 94 kr | 75 kr | 56 kr |
| Bilar, 6-12,4 m | 459 kr | 367 kr | 275 kr |
| Bilar, yvir 12,4 m 6 | 89 kr | 551 kr | 413 kr |



# Tey drukku bøkur

**Ein kafé, har borðreitt verður við bókum. Soleiðis kann árligi bókadagurin hjá Rithøvundafelagnum best lýsast. Fólk fingu høvi at práta við rithøvundar og síggja nýggjastu bøkurnar, sum eru komnar til jóla.**

BÓKADAGUR
*Ingi Rasmussen*

Fólk gingu og kagaðu í bøkur, lurtaðu eftir upplestri og samrøðum við rithøvundar ella nýttu høvi at spyrja høvundan, hvat tað í grundini var hann meinti við.

Tað var leyst og hugnaligt, tá árligi bókadagurin varð hildin í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Hetta er annað árið, at Rithøvundafelagið skipar bókadagin sum eina kafé, og tað tykist teimum, sum drekka bøkur, at dáma væl.

Hetta er kortini eisini ein sølustevna, sum skal skapa ein so frægan áhuga fyri bókunum, at fólk fáa hug at keypa tær.

Bókasølan í SMS stendur fyri at seta framsýningina upp, og stjórin Kári Árting heldur, at dagurin eisini hevur týdning fyri handlarnar.

– Fjølmiðlarnir gera ikki nógv burturúr føroyskum bókum. Tað er nærum tøgn, tá ein bók kemur út, og bara hendinga ummæli síggjast. Við einum slíkum bókadegi fáa vit vent bókunum og tikið samanum útgávurnar, sigur Kári Árting.



*Kári Árting (vm) fær sær eitt prát um yrkingasavnið hjá Niels Una Dam »Rótleys tøgn«*

*Mynd: Jens K. Vang*

## Fleiri fólk í ár

Nakað væl fleiri fólk vitjaðu bókadagin í ár, og hetta er eitt frálíkt høvi hjá rithøvundum at gera vart við seg.

Skráin var góð og rúgvusmikil, og barna- og ungdómsbøkurnar vóru væl umboðaðar. Brynhild Andreasen og Sólrun Michelsen lósu og søgdu frá teirra nýggjastu bókum. Siðsøguligar bøkur hava altíð havt serliga stóran áhuga í Føroyum, og áhugavert var at hoyra Ingrid Sondum práta við systkini Elina og Axel Mortensen um tíðina, tá tey vuksu upp á Tvøroyri.

Yrkingasøvnini hava havt eitt gott ár. Á bókadegnum lósu Niels Uni Dam og Steinbjørn B. Jacobsen úr sínum nýkomnu yrkingasøvnum, og prátað var við Jóanes Nielsen um hansara skaldskap.

## Bókin livir

Bókasølumaðurin heldur, at føroyska bókin livir væl eftir umstøðunum, men saknur er í einari nýggjari skaldsøgu.

– Tað stendur bara væl til. Serliga barnabøkur og siðsøguligar bøkur koma nógvar út. Nøkur yrkingasøvn eru eisini komin út, men tíverri er ongin rættilig skaldsøga komin út í ár, og sæð burtur frá Harry Potter, sum serliga er til barnsligar sálir, so er heldur ongin týdd. Tað er ikki lætt at skriva skaldsøgur, og føroyski marknaðurin er næstan ómøguligur at arbeiða á, tí hann er so lítil, sigur Kári Árting.

Á bókadegnum legði Rithøvundafelagið eina nýggja heimasíðu á internetinum fram. Hon er at finna á www.rit.fo.

# Tá deyðin er ein drívmegi

**»Deyðin er drívkraftin« er heiti á nýggjum greinasavni eftir Jógvan Isaksen. Tittulin sipar í mestan mun til skaldskapin hjá Williami Heinesen, sum helvtin av bókini snýr seg um.**

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*

Deyðin er ikki fremmandur, men ein fylgissveinur, sum altíð er í nánd.

Soleiðis sigur Jógvan Isaksen um skaldskapin hjá okkara heimskenda tjóðarskaldi, Williami Heinesen, sum er høvuðsevni í nýggja greinasavninum hjá Jógvani.

Hóast skaldskapurin hjá William Heinesen altíð er ógvuliga gjøgnumhugsaður og medvitin um skrivingina í sjálvum sær – og á tann hátt modernaður – so er tann aldargamla vitanin um komplementaritet millum lív og deyða í óvanligan mun partur av sama ritverki, greiðir Jógvan frá.

Tveir javnaldrar og vinmenn hjá Williami Heinesen eru eisini umboðir í savninum. Teir eru Jørgen-Frantz Jacobsen og Heðin Brú. Eisini er grein um skemt í føroyskum skaldskapi og ein umrøða av ævintýrhøvundunum C.S. Lewis og Roald Dahl.

At enda fevnir greinasavnið eisini um tríggjar persónligar greinir um at skriva krimi, um at ummæla og um ein krimiserfrøðing úr Vági, sum hevur havt fittan týdning fyri Jógvan Isaksen.

Permumyndina til »Deyðin er drívkraftin« hevur William Heinesen gjørt. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav bókina út. Hon er 199 síður og kostar 250 krónur.

# Føroya Sparikassi fær herðaklapp

**Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum hevur gjørt av at heiðra Føroya Sparikassa fyri at hava gjørt høvuðsskrivstovuna Yviri við Strond atkomiliga fyri øll**

VIÐURKENNING
*Ingi Rasmussen*

MBF heldur, at Føroya Sparikassi hevur uppiborið eitt herðaklapp.

Á altjóða handikapdegnum, sum er í dag 3. desember, fær Sparikassin eina viðurkenning fyri at hava gjørt nýggja høvuðsbygningin Yviri við Strond, sum varð keyptur frá Føroya Fiskasølu, fyrimyndarliga góðan hjá fólkum við breki. Viðurkenningin til Føroya Sparikassa verður givin við hesi grundgeving:

»Føroya sparikassi hevur umbygt bygningin, so hann er atkomiligur fyri øll. Við at gera bygningin so atkomiligan, er møguleiki bæði at vera kundi og starvsfólk uttan mun til førleika.

Føroya Sparikassi og hugburður hansara kann verða ein fyrimynd fyri onnur, tá bygging, umbygging og onnur atkoma skal fremjast, so luttøka í samfelagnum kann tryggjast øllum.«

Herfyri sóknaðist MBF eftir góðum uppskotum til viðurkenningina.

– Fýra onnur góð uppskot komu inn, og tað er at fegnast um, sigur Anna Suffía Durhuus, dagligur leiðari á MBF.

Hini uppskotini verða almannakunngjørd á Altjóða Handikapdegnum.



# Fullfíggjaðar løtur

**Bókarøðin »Meðan løtur líða« eftir Marionnu Debes Dahl er fullfíggjað, nú triðja bókin kemur út.**

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*

– Vit skreiddu eisini í bankabrekkuni. Tað minnast helst nógv í dag. Og tá var bara ein bilur. So skuldi ein standa niðri hjá Frants Restorff og rópa: »Bilurin, bilurin! Nú kemur bilurin!« So máttu vit steðga. Tað var einki, sum æt.

Soleiðis greiðir Rigmor Restorff frá í triðju bókini í bókarøðini »Meðan løtur líða«, sum Marianna Debes Dahl hevur skrivað.

Bókarøðin byggir á eina sendirøð, sum Marianna fyri nøkrum árum síðan skipaði fyri í Útvarpi Føroya.

Sendingin fevndi um samrøður við tjúgu fólk, sum eru fødd millum 1906 og 1924. Tey greiða frá gerandisdegnum tíðliga í síðstu øld. Hesaferð eru evnini eitt nú spøl úti vetrarhálvuna, skúlin, jarðarferðir og jól.

Fyrsta bókin í røðini kom út í 2000, onnur í 2001 og nú triðja bókin kemur út, er bókarøðin fullfíggjað.

Bókin er skrivað í beinleiðis talumáli, og tað kennist sum at sita í hugnaligari stovu og lýða á, meðan tey gomlu leita aftur í tíð. Hjá teimum, sum eldru er, vekir bókin gomul minnir, og hjá okkum, sum yngru eru, er tað læruríkt at frætta, hvussu tað einaferð var.

Í bókini eru 64 myndir frá fyrra parti av farnu øld. Úr fotomynd hjá Petru í Koytu hevur Ingi Joensen evnað kápuna. Forlagið Fannir gevur út, og bókin fæst bara innbundin. Hon er 145 síður og kostar 220 kr.